# Fiskavirkini eru væl fyri at taka eina afturgongd

**- Men nógvar íløgur eru fíggjaðar yvir raksturin, samstundis sum fígging av goymslum og skuldarum seta alsamt størri krøv til rakstrarfígging. Tí kann roknast við, at gjaldførið hjá mongum virkjum er hart spent, sigur Jóhan Martin Jacobsen, sum starvast hjá Rasmussen & Weihe**

FLAKAVINNAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Grannskoðarafyritøkan, Rasmussen & Weihe, hevur gjørt tvær sonevndar roknskapargreiningar. Onnur snýr seg um føroyska fiskiskipaflotan; hin um flakavinnuna.

Á kunnandi fundi fyri viðskiftafólki hjá fyritøkuni síðsta fríggjadag legði Jóhan Martin Jacobsen, sum starvast hjá Rasmussen & Weihe, fram hesar greiningar.

Í blaðnum í gjár gjørdu vit nakað burtur úr tí, sum sagt varð um fiskiflotan, og í dag fara vit í stuttum at hyggja at tí, sum sagt verður um flakavinnuna.

## 11 feløg

Greiningin um fiskavirkini, byggir á gongdina hjá 11 feløgum, sum reka flakavinnu, og greiningin er grundað á almennu roknskapirnar hjá hesum feløgum árini 1998 til 2002. Upplýsingar um eitt nú ráfiskanøgd, nettosølu og ráfiskakostnað hevur Rasmussen & Weihe eisini útvega sær hjá hesum feløgum.

Feløgini, sum eru við í greiningini, eru P/F Kósin við 12,2% av ráfiskinum, sum hesi feløg hava tikið ímóti í 2002, P/F Føroya Fiskavirking (48,4%), P/F Fiskavirkið (9,0%), P/F Vaðhorn Seafood (3,1%), P/F Delta Seafood (3,6%), P/F Sandoy Seafood (10,9%), P/F Norðís Seafood (3,7%), Sp/F Eystís Seafood, sum er við frá 2000 (1,8%), P/F Vestís, sum er við frá 2001 (1,7%), P/F Suðurís, sum er við frá 2002 (0,3%) og P/F Palm Seafood við 5,3% av ráfiskinum.

## Skrásetingar ikki eins

Í frágreiðingini, vísir Rasmussen & Weihe á, at roknskapirnir hjá luttakandi feløgunum eru uppsettir ymiskt, og konti eru bólkaðar ymiskt. Væntandi er heldur ikki, at øll feløgini skráseta sínar bókingar heilt eins.

– Hetta kann viðføra, at feilir kunnu vera í samanlagda roknskapinum fyri øll feløgini, men hetta hevur helst bert smávegis týdning.

Feløgini, P/F Delta Seafood og P/F Sandoy Seafood, hava ikki ynskt at lata av hondum eyka upplýsingar. Kortini hava Rasmussen & Weihe valt at hava hesi virkini við í greiningini við almennu ársroknskapunum sum grundarlag. Harumframt hevur grannskoðarafyritøkan við støði í prísgongdini og øðrum mett um, hvørji vantandi tølini eru. Við mettu tølunum, er samsvar millum brottuvinningin, sum feløgini hava uppgivið í almennu roknskapunum.

## Afturgongd

Í frágreiðingini um fiskiflotan, legði Jóhan Martin Jacobsen dent á, at nógvar detaljur eru í eini slíkari greining, og tí hava tey, sum lesa frágreiðingina, høvi at gera sínar egnu niðurstøður.

– Sama er við flakavinnuni, tí heldur ikki her hava vit eina eintýdda niðurstøðu um gongdina.

Kortini staðfesti Jóhan Martin, at virkini sum heild hava verið fyri eini stórari framgongd árini 1998 til 2002, tó at tølini fyri 2002 eru heldur lakari enn fyri 2001.

– Men tað tykist, sum vend er komin í gongdina.




*Her greiðir Jóhan Martin Jacobsen, sum starvast hjá Rasmussen & Weihe, frá gongdini í flakavinnuni seinastu 5 árini.*

Tær ábendingar, sum eru um gongdina í 2003, benda á, at farna ár var munandi verri enn 2002.

## Virkini væl fyri

Tað tykist, segði Jóhan Martin, sum um kappingin um ráv øruna við útlandið er munandi harðnað í 2001 og serliga í 2002.

– Hetta kann koma at merkja, at virkini mugu gjalda meira fyri ráfiskin, samstundis sum lønirnar eru hækkandi.

Hann helt, at tølini fyri 2003 og 2004 benda á eina afturgongd, um ikki aðrar marknaðarfortreytir byrgja upp fyri hesum.

– Virkini eru sum heild væl konsolideraði og mugu tí metast at vera væl fyri til at ganga eini afturgongd á møti. Kortini eru einstøk virkir, sum kanska ikki eru líka væl fyri.

Hann segði, at nógvar íløgur eru fíggjaðar yvir raksturin, samstundis sum fígging av goymslum og skuldarum seta alsamt størri krøv til rakstrarfígging.

– Tí kann roknast við, at gjaldførið hjá mongum virkjum er hart spent, segði Jóhan Martin.



*Vaðhorn Seafood er eitt av virkjunum, sum er við í greiningini hjá Rasmussen & Weihe*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Stór virðisøking

Samanløgdu roknskapartølini fyri hesi 11 virkini vísa, at raksturin hevur verið fyri stórari framgongd hesi 5 árini (1998 til 2002), tó at raksturin er versnaður nakað í 2002 í mun til árið fyri.

– Tølini vísa, at ráfiskanøgdin er vaksin hvørt ár til 2002, tá ið nøgdin minkar nakað.

Jóhan Martin segði, at samanlagt er ráfiskanøgdin økt við 18% hesi 5 árini. Sølan er økt 29%, samstundis sum ráfiskakostnaður v.m. bert er øktur við 15%.

– Við hesum hevur flakavinnan staðfest eina stóra framgongd í virðisøkingini, bæði í krónum og prosentum hesi árini.

Starvsfólkakostnaðurin er vaksin á hvørjum ári, og í 2002 er hann 41% størri enn í 1998. Posturin, »annar rakstrarkostnaður«, sum eitt nú fevnir um streymgjald, oljunýtslu, viðlíkahald, reingerð, flutningsgjøld og skrivstovuhald, er vaksin á hvørjum ári. Árini 1998 til 2002 er vøksturin heili 95%.

## Stórar íløgur

Jóhan Martin segði, at úrslitið áðrenn rentur og avskrivingar vaks hesi 5 árini við 92%, men er síðan fallið eitt sindur aftur. Kortini er hetta tal 75% størri í 2002 enn í 1998.

– Stórur vøkstur er í avskrivingum, nevniliga heili 165%. Orsøkin er stórar íløgur í framleiðslutól. Hinvegin eru rentuútreiðslurnar falnar síðan ár 2000.

Hann segði, at ársúrslitið fyri árini 1998 til 2002 vaks við 115%, men í 2002 var fallið tó 15% í mun til árið fyri.

## Framleiðsla og ráfiskur

– Framleiðsluvirðið øktist árini, 1998 til 2002, við 8,7%, samstundis sum ráfiskakostnaðurin fall við 2,8%. Tað merkir, at fiskavirkini hava staðfest ein vøkstur í virðisøkingini uppá 35%. Hetta gevur ábendingar um, at virkini hava staðfest vaksandi skiftisavlop í krónum fyri hvørt kilo av ráfiski.

Jóhan Martin segði, at sambært teimum tølum, sum liggja til grunds fyri greiningini, hevur ráfiskakostnaðurin verið alsamt fallandi, og árini 2001 til 2002 er minkingin rættiliga »markant«, sum tikið verður til.

Ein talva, sum er við í greiningini hjá Rasmussen & Weihe, vísir, at útflutningurin av heilum fiski var 50.000 tons í 2002.

– Møguliga hevur økta virðisøkingin í 2001 og 2002 verið viðvirkandi til gongdina í útflutningi av heilum fiski. Tað er í hvussu er áhugavert at síggja, hvussu »markant« virðisøkingin er í 2002, samstundis sum útflutningurin av óvirkaðum fiski tvífaldast. Lønirnar hækka eisini »markant« í 2002, og er hetta helst viðvirkandi til, at virkini lata lutfalsliga minni fyri fiskin, segði Jóhan Martin.

## Ársverk í vinnuni

Ein onnur talva vísir, at hesi 11 feløgini, talan er um í greiningini, hava 1.253 ársverk í flakavinnuni í 2002. Talið er eitt sindur minni í 2001 og uppaftur minni árini aftur til 1998. Men her skal havast í huga, at øll 11 feløgini eru ikki við í greiningini heilt aftur til 1998.

– Talvan vísir, at í 2002 eru 176 ársverk fleiri enn í 1998. Miðal árslønin er økt øll árini, tó mest í 2002. Samanlagt er miðal árslønin hækkað 21,1% hesi 5 árini. Ráfiskur fyri hvørt ársverk er øll árini á sama støði. Hetta merkir, at talið av ársverkum sum heild fylgir vøkstrinum í ráfiskanøgdini, segði Jóhan Martin Jacobsen.



*Samstundis, sum virðisøkingin vaks »markant« í 2002, tvífaldaðist útflutningurin av óvirkaðum fiski*